**MASSAGUBONKUR TIL SØLU**
Ein óbrúktur massagubonkur til sølu. Vigar bert 12 kg. og er ljósur á liti. Ymisk útgerð fylgir við. Ring og hoyr nærri á
*Tlf. 216680 ella 313830*

**MÁLPARTABRØV**
Drigið er um málpartabrøv Kyndils: 1. vinningur 036, 2. vinningur 177. Vinnarar kunnu seta seg í samband við tlf. 313089
*Kyndil*

**SPILDURNÝGGJ NOKIA 3310**
Als ikki brúkt. Í orginalari eskju. Manual og ladari fylgja við. Selist fyri 850 kr.
*Tlf. +45 32861312 ella +45 26394786*

**SONY ERICSON T 610 FARTELEFON**
Næsta ikki brúkt. Innbygt digitalkamera. Headsett við radio fylgir við. Í orginalari eskju. Er sum spildurnýggj. Selist fyri 1.250 kr.
*Tlf. +45 32861312 ella +45 26394786*

**SERA GOTT MYNDATÓL**
Eitt Canon EOS Rebel-X myndatól til sølu. Hevur eina 35-80mm linsu og eina 75-300mm linsu, umframt kraftigt blitz, polariseringsfiltur og UV filtur. Alt sum nýtt Prísur. 4000,-
*Tel. 521339*

**BORÐTENNISBORÐ YNSKIST**
Brúkt borðtennisborð ynskist.
*Tlf. 318890 ella 257227*

**HEVUR NAKAR**
Ein glas kølidisk at selja mær. Uml. 100 br 80 h. Vinarliga ring
*Tlf. 268920*

**CANON POWERSHOT 300 3.2 MP**
Digitalt camera til sølu fyri 2.200 kr. Í góðum standi, næstan ikki brúkt. Ymiskt tilhoyr fylgir við.
*Tlf. 227781*

**OMEGA LUMMAUR**
Orginalt Omega Grand Prix 1900 ur, við leður lumma. Silvur við gull legering. stødd Ø 52 mm H 15,5 mm. Kassa nr. 6177038, urverk nr. 5395096. Perfekt til føroyska búnan. 2.500 kr.
*Tlf. 314587*

**NOKIA 8210**
Lítið brúkt fartelefon í sera góðum standi, virkar perfekt. vid ladara einans 900 kr.
*Tlf 314587*

**NIKON COOLPIX 3500**
Lítið brúkt digitalt kamera, 3,2M pixel við ladara, 64MB Compact Flash og nýggjum battaríi. Í sera góðum standi, virkar perfekt. 2.300 kr.
*Tlf 314587.*

**GÓÐ MOLD**
Fæst fyri 500 kr. lessið + koyring. Møguleiki fyri at grabba inn í havar v.m. Ring
*Tlf. 211431 ella 222711*

**JØRÐ Á SELATRAÐ TIL SØLU**
8 gyllin í Heimara Garðshaga til sølu fyri hægstbjóðandi.
*Tlf. 722018*

**MÁLNINGUR TIL SØLU**
Málningur (Nes Hvalba) av Eivind Mohr frá 1985 til sølu. Stødd 86x67 við rammu. Prísuppskot 9.000 kr.
*Tlf. 251007*

**TIL SØLU**
5 krónur frá 1969 75 kr. pr. stk.
*Tlf. 212289*

**STJØRNUKIKARI TIL SØLU**
Stendur á einum »podie« við 3 beinum, við eru 2 okulat og eitt ljóðfiltur. Prísur 1.500 kr.
*Tlf. 220744*

**SIEMENS S55**
við tilhoyrandi camera. Er sera væl hildin, sær út sum nýggj. 1 ára gomul. Uppladari, cd, káplar til telduna fylgja við. Litskermur. Til sølu fyri einans 900 kr.
*Tlf. 373118 ella 223449*

**TIL SØLU**
Uml. 50 grammofonplátur, musikkur fyri 45-50 árum síðani eru til sølu, sera bíliga. Skriva til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
*Bill. mrk. 1922b*

**KONTAINARAR**
1 stk. 40 fót kontainari til sølu. Stoypt gólv og ljósamatur í sera góðum standi. Til sølu fyri kr. 15.000
*Tlf. 226445*

**NÝGGJAR RAMMUR**
21 stk. ymsar støddir, úr mahogni, til sølu fyri 20.000,- Nýprísur 50.000.
*Tlf. 226445*


# Skipasmiðjan søkir skrivstovunæming

Hevur tú hug at koma í skrivstovulæru á Tórshavnar Skipasmiðju?

Tú hevur miðnámsútbúgving, og harumframt kundu vit hugsa okkum, at tú:

- Ert opin og hevur lætt við at samskifta
- Dugur mál (føroyskt, tey norðurlendsku og enskt)
- Hevur góðan teldurførleika
- Ert framfýsin og ágrýtin

Í lærutíðini fert tú at starvast á ymsum deildum hjá fyritøkuni í Havn.
Talan verður um nakrar mánaðir á goymslunum, í bókhaldinum, í lønardeildini og í innkeypsdeildini. Góður møguleiki er fyri føstum starvi eftir lokna lærutíð. Tað er ikki verri, um tú hevur áhuga fyri skipum og teknikki.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til

**P/F Tórshavnar Skipasmiðja**
Att.: Helgi Nielsen
Postsmoga 65
110 Tórshavn

í seinasta lagi tann 11. oktober 2004. Hevur tú okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi, kanst tú venda tær til Helga Nielsen á tlf. 30 11 00.

*Á p/f Tórshavnar Skipasmiðju starvast um 230 fólk við at veita tænastur og sølu av eykalutum til skipaflotan og vinnuna á landi. Hesar tænastur umfata mekaniskar, stál, timbur, máling, beding, tekniska ráðgeving og beinleiðis sølu av goymslu. Skipasmiðjan hevur deildir í Havn, á Skála, í Vestmanna og í Runavík.*

# Skála skúli

**Søkt verður eftir 1 lærara ella vikari at undirvísa 16 tímar um vikuna frá 18. oktober og fyribils árið út.**

**Lærugreinarnar eru danskt í 6. og 7. flokki, støddfrøði í 5. og handaverk og list.**

**Starvið er fyri lærara í sjúkafarloyvi.**

Starvið verður lønt samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast frá fyrstalæraranum á tlf. 442118 ella 211360.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 5. oktober 2004.

**Skúlastýrið fyri Skála skúla**
v/ Rosu Prestá
480 Skáli

# Til sølu
## Fiat Cinquecento



Árg. 9/96 · Bert koyrt 56000 km
Ný sýnaður · Fitligur lítil bilur við sóltaki · Sera orkusparandi og bíligur í rakstri.

**Prísur:**
**kr. 35.000,-**
**Útgjald einans kr. 10.000,- Restina práta vit um.**

Sosialurin 341800

Sí onnur tilboð á www.bilfridkan.fo
Bilfríðkan á Hjalla
Tel 35 73 00 ella 21 73 00
landsins lagaligasta brúktbilafígging


## HEILSANIR



**Góði elskaði pápi**
Hjartaliga tillukku við 63 ára degnum 26. sept. Eg eri so góð við teg.
**Heilsan eftirnølarin**

**Góða fitta Turið**
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingadegnum. Jesus pápi signi framtíð tína. Takk fyri at tú ert ein so fitt og røsk genta.
**Heilsan mamma, pabba, Allan og Elin Maria**




## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

## Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:......................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ...........................................................................
Bústaður: .....................................................................
Bygd/býur: ..................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«




# Uttanfyri alt mark



*Hatta er heilt óvanligt. Ert tú misnøgdur við okkurt, so skulu ábreiðslurnar sigast innanhýsis í flokkinum. Tú fert ikki og langar út á handan hátt, sigur Signar á Brúnni.*
*Mynd: Savnsmynd*

**Fyrrverandi ting- og landsstýrismaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum, Signar á Brúnni, heldur, at álopið hjá Tórbirni Jacobsen á Høgna Hoydal er uttanfyri alt mark. – Tað er alt ov buldraligt í flokkinum, heldur hann**

ÓSEMJA Í TJÓÐVELDISFLOKKINUM
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Tað er ein andsøgn í, at hann gongur á odda og tosar um tygn á Føroya løgtingi, og samstundis leggur hann persónliga eftir formanninum í einum hvassorðaðum lesarabrævi

Fyrrverandi ting- og landsstýrismaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum, Signar á Brúnni, heldur lítið um framferðarháttin hjá Tórbirni Jacobsen í málinum um skrásett parlag, har eysturoyartingamaðurin legði floksformannin undir at lúgva og manipulera.

### Óvanligt

Signar á Brúnni hevur sitið á tingi fyri Tjóðveldisflokkinum í sløk 32 ár. Hann varð fyrstu ferð valdur á ting í 1970, og hann sigur seg ikki minnast, at tingmaður áður hevur lagt persónliga eftir einum floksformanni, sum Tórbjørn Jacobsen gjørdi í lesarabrævinum.

– Hatta er heilt óvanligt. Ert tú misnøgdur við okkurt, so skulu ábreiðslurnar sigast innanhýsis í flokkinum. Tú fert ikki og langar út á handan hátt, sigur Signar á Brúnni.

Hann leggur afturat, at hann kennir dømi um, at floksformaður og tingmaður hava munnhøggast alment, men tað hevur altíð verið um eitt politiskt mál, og ikki á persónliga stignum.

– Persónlig álop eiga snøgt sagt ikki at koma fyri, og hetta er uttanfyri alt mark, heldur fyrrverandi tjóðveldistingmaðurin.

Spurdur, hvørjar avleiðingarnar eiga at vera, svarar Signar á Brúnni, at tað ynskir hann ikki at gera nakra viðmerking til

### Buldraligt

Signar á Brúnni heldur, at tað er ov buldraligt í Tjóðveldisflokkinum. Hann nevnir, at tað er ikki fyrstu ferð, at Tjóðveldisflokkurin kemur í ringt ljós orsaka av ósemjum innanhýsis í flokkinum

– Hetta er enn eitt dømi um, at tað er ov buldraligt í flokkinum. Hetta prógvar eisini, at tað er ein keðilig arbeiðsgongd í flokkinum, sigur Signar á Brúnni

# Tobbi stendur einsamallur

**Bæði aðalstjórn Tjóðveldisfloksins og Eysturoyar Tjóðveldisfelag átala framferðarháttin hjá Tórbjørn Jacobsen í samband við álopið á formannin í Tjóðveldisflokkinum**

ÓSEMJA Í TJÓÐVELDISFLOKKINUM
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tórbjørn Jacobsen tykist ikki at verða best umtókti limurin í Tjóðveldisflokkinum í løtuni. Um vikuskiftið segði formaðurin í Eysturoyar Tjóðveldisfelag, Klæmint Østerø, við Útvarp Føroya, at felagið á ongan hátt stóð aftan fyri skuldsetingarnar hjá Tórbjørn Jacobsen ímóti Høgna Hoydal.

Aðalstjórn Tjóðveldisfloksins hevur eisini verið saman á fundi um vikuskiftinum. Millum annað bleiv álopið á Høgna Hoydal, formann floksins, í fjølmiðlunum, viðgjørt. Í tíðindaskrivi átalar aðalstjórnin harðliga og tekur frástøðu frá tí skriving sum er farin fram móti formanni floksins.

Vit hava fyrrapartin roynt at fingið samband við Tórbjørn Jacobsen, men tað eydnaðist okkum ikki.

# TIPS 12 úrslit
**Vika 39 – 26. sept.**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | AGF–FC Midtjylland | 1 |
| 2. | FC Nordsjæl.–FC Københ. | 2 |
| 3. | OB–AaB | 2 |
| 4. | Randers FC–Silkeborg | 1 |
| 5. | Viborg–Esbjerg | 1 |
| 6. | Frem–SønderjyskE | 1 |
| 7. | Fremad Amager–B 93 | 1 |
| 8. | Nykøbing F All–AB | X |
| 9. | Næstved–Brønshøj | X |
| 10. | Vejle–Køge | 2 |
| 11. | FC Roskilde–Slagelse | 2 |
| 12. | Lyngby–B 1909 | 2 |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 12 røtt: | **Eingin vinnari** |
| 11 røtt: | **12.192,- kr.** |
| 10 røtt: | **898,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

# V4-dráttur
## í drátti nr. 1556
## 25. sept. 2004

**Tølini:** 2 - 8 - 9 - 21 - 24 - 37 - 40 - 42 - 52 - 54 - 55 - 56 - 70 - 76 - 86 - 94

**Vinnarar:**
Snars. nr. 2651617, Farseðil
Um ikki fleiri vinnarar verða funnir, er vinningurin 31.447,- kr. í part

**Eykavinningur**
Seðlarnir til henda dráttin eru eisini við í eykaspælinum í oktober, har vinningurin er 6.000 kr. um mánaðin í eitt ár.

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## KROSSORÐ

Í blaðnum fríggjadagin manglaðu tølini í krossorðagátuni, so ikki bar til at skriva loysnarorðið.

